# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

Fríggjadagin 11. sept. fingu Edith Kruse og Edvard Pauli Andreasen, Keypmannahavn, eina dóttur á Hvidovre Hospital. Hon vigaði 3354 gram og var 50 cm long.

17. september fingu Svanna Petersen og Jón Bjarnason, Vágur, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3830 gr.

17. september fingu Anita Olsen og Tummas Vilhelm, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4259 gr.

18. september fingu Hildigunn Thomsen og Jens Nolsøe Dam, Argir, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4450 gr.

19. september fingu Hildur Steingrímsdóttir og Sigurð Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

19. september fingu Durita og Arnfinnur Gudjónsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

20. september fingu Jakobina og Bárður Niclasen, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4600 gr.

### 65 ár

Fríggjadagin 02.10.2009 fyllir Kitty Gudmundsen í Vági 65 ár, føðingardagurin verður hildin í Billiardhúsinum frá kl 19. Øll er hjartaliga vælkomin.

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 30 sept. verður Hannemia Petersen Runavík 90 ár, Tey ið vilja heilsa uppá Hannemiu, eru vælkomin í Sjókafeina mikukvøldið kl.18

## Minningarorð um

# Gunnar í Myllugarðinum í Sumba



Stødd uttanlanda saman við allari mínari familju, fingu vit feigdarboð heimanífrá, sum skelkaði okkum øll. Svágur mín, mín góði vinur, sum eg hevði kent alt livið, var bráðliga deyður.

Vit skiltu hetta als ikki, tosaði við hann kvøldið fyri vit fóru, har hann ynskti okkum góðan túr, og so tað næsta vit hoyra, var hann ikki her meira.

Øll í familjuni kallaði hann Gunnar gubban ella eisini Mylluabbin, hann var veruliga gubbi onkran, men øll familjan átti hann.

Hvør var Gunnar? Gunnar varð sonur Gunnar Poulsen, vanliga nevndur Gunnar á Ólafløtti ella gamli Gunnar og Katrinu. Lagnan hevur verið hørð við familjuna hjá gamla Gunnari og Katrinu. Gamli Gunnar doyði í bestu árum eins og fleiri av børnunum, sum vóru 10 í tali, doyðu í bestu árum, soleiðis at tað nú bara eru fýra eftir á lívi.

Gunnar varð ítróttarmaður á ungum árum, hann varð við at vinna fyrsta føroyameistarheitið í kappróðri við sumbinginum. Hann varð ein kvæðakempa av Guðs náði og verður saknurin í Sumbiar dansifelag stórur, nú Gunnar ikki er meir.

Tað er ikki so nemt at lýsa ein sum Gunnar. Hann fylti nógv, har hann var, bæði so og so, hann hoyrdist, harðmæltur sum hann var, og sást har hann var, alt upp á ein jaligan hátt. Hann var ótrúliga famijukærur, vísti áhuga fyri øllum sínum. Honum dámdi væl at fyriskipa. Vit vóru øll familjan niðri í Danmark í summarhúsi, ein ógloymandi túrur og ongin so spentur sum Gunnar og hansara partur lá ikki eftir at “orna og manerera” so alt skuldi klappa, og so seint sum í summar vóru vit ein frálíkan túr við Norrønu, eisini hava vit verði fleiri jólatúrar saman.

So tað var ræðuliga løgið at koma suður, og hann ikki var, hann sat ikki í sínum djúpa stóli.

Góða systir, tú hevur lukkutíð fingið tey evni í vøggugávu, at verða jørðbundin og hava bæði bein á jørðini. Tú hevur um nakar følt sviðan av lívinum, sum ikki altið gekk eftir vild og eisini nú tú skuldi uppliva hetta, megnar tú at síggja tað góða og virðir sum lívið hóast alt hevur at bjóða tær, nú sum einsamalla.

Tí tað vita vit øll, sum standa tykkum nær, at tín gerandisdagur nú verður rættiliga øðrvísi, nú tú misti tín holla stuðul, tín mann gjøgum nærum 45 ár, tí har sum annað var, var hin ikki langt burtur.

Sum tað er gott, at tykkum untist at blíva omma og abbi. Hetta var stór hending, sum tað er fyri øll sum uppliva tað. Tit hava gingið upp í tað við lív og sál. Sera stolt bæði og eru nógvir túrar gjørdir norður um fjørð, at vitja tykkara børn og barnabørn og er tað ein stórur uggi nú hjá tær góða systir.

Vit fara øll at saknað okkara góða Gunnar og takka fyri nógvar ríkar løtur vit fingu saman, minnir vit altíð fara at verja og goyma. Okkara djúpu samkensla við tær góða systir, Jørn og Jan við familju.

Við hesum fátæku orðum vil eg hervið lýsa frið yvir minnið um mín góða svág og vin Gunnar Poulsen í Myllugarðinum.

**Martin við familju**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp,
tá okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi
og langabbi

**Theodor Sigurd Haraldsen**
Sandavágur

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á Sýnuni, sum vóru um
hann til tað síðsta.
Tøkk fyri troystarík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Sýnuna.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið, og
tykkum, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Anna**
**Tummas, Nomi og Margeir**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp,
tá okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma,
dóttir og systir

**Alis Ørvarodd**
Tórshavn

so brádliga andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri troystarík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur
til Krabbameinsfelagið.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið,
og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta
hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Margeir**
**Theodor, Oddmar og Rói**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara
góði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Tórir Thomsen**
Norðragøta

andaðist og varð jarðaður.

Takk til heimarøktina.
Takk til prestin og tykkum, ið hjálptu okkum so væl
við jarðarferðini og ervinum.
Somuleiðis takka vit fyri blómur, kransar og
heilsanir - og øllum tykkum mongu, sum fylgdu
honum til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Hjørdis og Katrin**